


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Visti tú at.....



Val
BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN
Tjóðveldi

Av teimum sum hava verið sjúk í eitt ár kemur bert ein út av 10 til arbeiðis aftur? Og at fleiri longu hava mist arbeiðið, tá tey hava verið sjúkrameldað í 12 vikur? Tað vístu hagtøl úr Danmark og neyvan er støðan frægari her.

Tí er sera umráðandi at virka skjótt, tá fólk gerast sjúk.

Í arbeiði mínum sum virkiskonsulentur uttanlanda var leiklutur mín var saman við tí sjúka, arbeiðsgevaranum og yrkisfelagnum hjá tí sjúka at finna munagóðar loysnir, so viðkomandi kundi koma til arbeiðis aftur sum skjótast, men á ein skynsaman hátt. Vit plagdu at virka fyri at finna eina loysn, har allir partar høvdu "ein góðan smakk í munninum".

Fyrsta stig á leiðini var ein sonevnd rundborðssamrøða. Hetta var ein fundur har hin sjúki, arbeiðsgevarin, umboð úr yrkisfelagnum og virkiskonsulenturin tosaðu um støðuna. Tosa varð ikki so nógv um sjálva sjúkuna, men um tørvin hjá tí sjúka. Til dømis, hvat viðkomandi megnaði hóast sjúkuna og hvørji atlit skuldu takast. Fleiri høvdu sjálvi hugskot til, hvørjar uppgávur tey megnaðu. Tosa varð um, hvussu nógvar tímar tey megnaðu at arbeiða, nær ráðiligt var at byrja o.s.fr. Viðhvørt var eisini lækni, sálarfrøðingur ella fysioterapeutur við á fundinum.

Aloftast var tað ikki stórvegis trupulleiki at finna munagóðar loysnir. Allir partar gleddust. Hin sjúki tí hann nú ikki bert var passivt sjúkur, men eisini fekk verið saman við starvsfeløgum sínum og brúk var fyri honum. Ofta er tað nevniliga so, at tað ávirkar sjálvsvirðið hjá fólki rættuliga skjótt, tá tey eru vorðin sjúk og eisini er greitt, at trupult kann vera, at fáa fótin inn á arbeiðsmarknaðin aftur, um ein er útihýstur/ sagdur úr starvi.

Tá tað eydnast at finna varandi loysnir fegnast eisini starvsfelagarnir og arbeiðsgevarin við. Starvsfelagir kenna seg tryggar, vitandi at um "eg gerist sjúk/ur er rúm fyri mær kortini." Vit funnu mangan loysnir, bæði tá fólk vóru sjúk eitt tíðarskeið, men eisini um fólk høvdu eina varandi sjúku.

Fundurin fann sjálvandi bert stað, tá hin sjúki kendi seg nóg birgan til tess, og tá partarnir vóru áhugaðir í einari losyn.

Pointið er, at meðan sjukradagpengamál er avgreiðslumál í Føroyum burtur av, tí einki munagott verður gjørt til tess at fylgja munnliga upp á dagpengamálini, verða tey sum eru sjúk í Danmark boðin til samrøðu á tí sum svarar til Almannastovuni, tá tey hava verið sjúk í 8 vikur. Tað er eitt lógarkrav. Prógvað er, at jú fyrr sovorðin mál verða viðgjørd, tess munagóðari og bíligari gerast loysnirnar.

Hugvekjandi, haldi eg. So eg haldi at vit áttu at tryggja, at sjúkradagpengamál ikki bert eru avgreiðslumál.

Arbeiðsmarknaðurin er tað eg brenni fyri, nevniliga, at øll hava nakað at fara upp til – eisini tey við skerdum førleika. Tøl úr DK vísa, at seinasta árið eru 25.000 nýggj fólk við skerdum førleika komin inn á arbeiðsmarknaðin. Flutt til føroysk tøl, kundi talan verið um 250 fólk – ein gloypubiti fyri samfelagið. Eg veit, at tað ber til - eisini her – sjálvandi við serligum átøkum. Ofta verður hildið, at fólk annaðhvørt skulu hava pensión ella arbeiða fulla tíð. Sannleikin er ikki annað hvørt, men bæði og. Mong teirra kunnu og vilja fegin arbeiða nakað. Megna vit tað ikki nú, verður tað ongantíð. Sum er fáa 8% af føroyingunum fyritíðarpensjón.

Lat okkum bretta upp um armar og virka fyri at arbeiðsmarknaðurin av álvara gerst rúmligur eisini í Føroyum. Ráðið fyri Breka, Vinnuhúsið og samtak hava gjørt greitt, at tey vilja virka fyri hesum. Eg fari at arbeiða fyri einum rúmligum arbeiðsmarknaði, um eg verði vald á ting komandi val.

# Heildarloysn fyri Sandoynna og Suðuroynna



Val
RÚNA SIVERTSEN
Sjálvstýrisflokkurin

**Tað er alneyðugt at útbyggja samferðslukervið á ein skilagóðan hátt. Tí er ikki nóg mikið bert at vera í móti, men eisini at hava eina loysn at vísa á, sum fremur framgongd á øllum økjum fyri alt landið**

Ein heildarloysn fyri Sandoynna og Suðuroynna má gerast eftir eini tíðarætlan, sum eisini gevur pláss fyri, at vit samstundis kunnu nýta pening upp á onnur samfelagsvirði. Skal Suðuroyggin yvirliva er alneyðugt at sambandið við meginøkið gerst betur.

Ein góð loysn fyri júst Suðuroynna hevði verið ein tunnil til Sandoynna, soleiðis at túratalið við Suðuroynna kundi verið minst tvífaldað.

Hetta er ein loysn, sum vit mugu gera eftir eini tíðarætlan, sum fyrst og fremst er fíggjaliga forsvarlig, men eisini tekur atlit til, at hon má fremjast, áðrenn Suðuroyggin doyr út.

# Nøgdsemiskanningin: eitt stórt herðaklapp til starvsfólkini á sjúkrahúsunum



Val
HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður, Javnaðarflokkurin

9 av 10 sjúklingum eru nøgd ella sera nøgd við viðgerðina, røktina og tænastuna tey fáa á føroysku sjúkrahúsunum. Hetta er heildarniðurstøðan nú fyrstu ferð í Føroyum er gjørd ein sonevnd nøgdsemiskanning, har sjúklingarnir sjálvir út frá egnum royndum hava givið sjúkrahúsunum karakter. Tað var Sjúklingaráðið sum fyri góðum ári síðani heitti á undirtaða landsstýrismannin um at seta slíka kanning í verk. Óheftur danskur stovnur hevur staðið fyri arbeiðinum.

Kanningin vísir eitt sera gott úrslit, tá vit hugsa um tann ógvisliga ágangin, partar av okkara sjúkrahúsverki hava verið fyri í fjølmiðlunum í langa tíð. Eg óttaðist fyri at hesin áhaldandi kritikkurin fór at síggjast aftur í nøgdsemiskanningini sum ein PISA-líknandi dómur yvir sjúkrahúsini.

**Føroysku sjúkrahúsini stóðu royndina**

Tí var eg ógviliga spentur uppá úrslitið. Tíbetur kunnu vit nú fegnast um, at sjúkrahúsini standa seg væl – eisini sjálvt um kanningin staðfestir at okkara sjúkrahús ikki heilt standa seg javnt við miðalstøðuna hjá donsku sjúkrahúsunum. Hetta er jú fyrstu ferð at slík kanning verður gjørd í Føroyum – í Danmark er hon gjørd 4 ferðir, so har hava sjúkrahúsini kunna lagt seg eftir at betra um støðuna, har sum úrslitini hava verið minni góð. Og akkurát tað sama kunnu vit nú vænta av okkara sjúkrahúsum, júst tað sum meiningin er við at gera slíka kanning.

**Álitisváttan til fakliga dugnaskapin hjá heilsustarvsfólkunum**

Tað besta við kanningini er, at á teim mest grundleggjandi virkisøkjunum standa sjúkrahúsini seg væl.

Hetta er m.a. viðv. teim lækna- og røktarfakligu veitingunum, har heili 90-95% hava stórt álit á fakliga dugnaskapinum hjá heilsustarvsfólkunum!

Viðv. upplivaðum feilum stóðu sjúkrahúsini seg væl – munandi betri enn donsku sjúkrahúsini. Í Danmark vóru 20% sum upplivdu feilir, meðan talið í Føroyum var 15%. Og tá feilir vóru, dugdu starvsfólkini væl at handfara teir

Eisini viðgerðargongdin verður mett positivt, har 88% hildu læknar og røktarstarvsfólk samstarva væl um viðgerð og røkt av sjúklingunum.

**Størstu trupulleikarnir við kunning og bíðitíðum**

Nøgdsemiskanningin peikar á nøkur øki, har neyðugt er við serligum innsatsi fyri at betra um viðurskiftini.

Tað snýr seg um kunningina til sjúklingarnar, bæði við innskriving, men serstakliga við útskrivingina. Her vóru heili 52% sum upplivdu, at tey vóru vánaliga kunnað um hvønn týdning teirra livíháttur hevði fyri heilsuna.

Ein annar stórur trupulleiki er ov nógv bíðitíð, bæði til at sleppa til innlegging, og millum ymiskar kanningar og viðgerðir undir innleggingini.

Ein triðji høvuðstrupulleiki er, at samskipanin millum sjúkrahúsini øðrumegin og kommunulæknarnar og heimarøktina hinumegin.

**Munurin millum tey 3 sjúkrahúsini**

Nú gera fjølmiðlarnir nógv burturúr, at tey smærru sjúkrahúsini standa seg munandi betri enn Landssjúkrahúsið í kanningini. Her er tó neyðugt at minna á, at tað fram um alt júst er Landssjúkrahúsið, sum fær allar tær kompliseraðu og truplu innleggingarnar, eisini allar tær sum man ikki klárar á teim smærru sjúkrahúsunum. Og tað setir starvsfólkini har undir munandi størri trýst. So tað er onki løgið, at sjúklingar tí oftari kunnu vera ónøgdir á Landssjúkrahúsinum enn á hinum.

**Hægri politisk raðfesting av sjúkrahúsunum**

Høvuðsboðskapurin í kanningini haldi eg tí ikki er munurin í nøgdseminum millum sjúkrahúsini, men at tey - øll trý - standa seg væl á teim grundleggjandi virkisøkjunum, og at tað eru fleiri innsatsøkir, har tey kunnu betra um dygdina. Hetta krevur eisini at vit í komandi samgongu raðfesta sjúkrahúsini hægri, við bæði fíggjarligum og politiskum uppbakningi.

# Hetta eru ikki bert hagtøl – tað eru menniskju



Val
HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Hagtølini siga, at nógvar kvinnur eins og nógv vælútbúgvin fólk trívast ikki í Føroyum. Orsøkirnar eru mangar. Ein av orsøkunum eru vantandi vælferðartænastur - hjá til dømis stakum uppihaldarum, og lágløntum føroyingum. Ein einsamøll mamma, sum vil brúka sína útbúgving og varðveita sítt arbeiði og sín førleika, hevur ongan møguleika at fá endarnar at røkka saman í dag. Tá ið húsaleiga, el, olja, stovnspláss og skatturin er goldin, er einki eftir av lønini. Helst røkkur lønin ikki so langt.

Men tað eru eisini tey væl útbúnu, ið velja Føroyar frá. Í hesum føri snýr tað seg um vantandi arbeiðs- og menningarmøguleikar hjá fólki við serligum førleikum.

Samfelagið hevur stóran tørv á kvinnunum. Longu nú eru uml. 2000 færri kvinnur enn menn í Føroyum. Hugsið um avleiðingarnar, um gongdin heldur fram! Hagtølini siga nevniliga, at tað eru kvinnur í aldrinum millum 20 og 39 ár, sum eru í stórum minniluta.

Vit hava so sanniliga eisini brúk fyri teimum væl lærdu. Vinnulívið, heilsuverkið útbúgvingarskipanin og ikki minst mentunarlívið - øll rópa eftir væl útbúnum fólki, kreativum fólki og fólki við fjølbroyttum royndum. Fólki, ið kunnu opna dyr og flyta mørk.

Hetta er ein katastrofal gongd, sum sigur okkum, at vit bæði mugu styrkja samhaldsfestið eins og tora at taka lut í alheimgerðini.

Tað er stór skomm fyri Føroyar, bara at lata standa til. Tað mugu ikki vera ósolidariskar skipanir og vantandi hugflog, sum ger, at so nógvir føroyingar velja Føroyar frá.

At venda gongdini er ein av størstu avbjóðingunum, skulu Føroyar innan fá ár teljast millum fremstu tjóðir.